# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



*11. juli fingu Hallur og Tóki ein lítlan beiggja. Hann vigaði 3230 gr og var 52 cm langur. Foreldur teirra eru Joan Eysturtún Blástein og Bogi Blástein. Tey búgva á Válinum í Vestmanna*



*14. juli fingu Heidi Michaela Restorff & Pætur Rasmussen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2600 gr*



*13. juli fingu Eyðbritt Midjord og Jens Christian Müller, Vágur, eina fitta diddu. Hon var 51 cm long og vigaði 3260 gr. Hon hevur fingið navn og eitur Elin Maria Müller*



*16. juli fingu Astrid Magnussen og Jan Suni Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3300 gr. Her situr Bára so stolt við sínum fitta lítlabeiggja*

5. juli fingu Hedvig Højgaard og Robert Waagstein, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3300 gr.

13. juli fingu Randi og Karstin Jensen, Sumba, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 3170 gr.

14. juli fingu Margit og Allan Joensen, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3900 gr.

14. juli fingu Elisabeth og Thom J. Djurhuus, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3600 gr.

16. juli fingu Diana á Skúr og Aref T. Olsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3300 gr.

17. juli fingu Jóhanna Vang og Aron Jacobsen, Skálafirði, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3200 gr.

19. juli fingu Hans Eivind og Eydna Olsen, Skopun, eina dóttur Hon var 50 cm long og vigaði 3020 gr.

19. juli fingu Katrin Petersen og Jóhan Magnus Johannessen, Oyrarbakka, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3000 gr.

19. juli fingu Susan og Fróði Benjaminsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3380 gr.

20. juli fingu Leila Anita Falkvard og Hans Marius Mouritzen Olsen, Sørvági, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3950 gr.

21. juli fingu Sára Strøm og Páll Holm, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3800 gr.

21. juli fingu Eyð Mørkøre Hansen og Thomas Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4965 gr.

22. juli fingu Sólbjørg Jacobsen og Hans Filip Mohr Jakobsen, Søldarfirði, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3890 gr.

22. juli fingu Dora Johannesen og Malmberg Simonsen, Sørvági, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4210 gr.

23. juli fingu Sóley og Niels Madsen, Sandavági, ein son. Hann var 55 cm langur og 3725 gr.

# Anna Sofía Vidtfeldt 50 ár



Leygardagin 25. juli fyllir Anna Sofía Vidtfeldt, fødd Poulsen, 50 ár. Anna Sofía býr á Sandi, men er ættað úr Skopun. Hon er dóttir Kristoffer og Siborg Poulsen, og er næstyngst av 7 systkjum. Pápi hennara var m.a. handilsmaður, og í handlinum í Búrið sleit hon barnaskógvarnar. So tað var kanska ikki so undarligt, at eftir at hon hevði starvast í banka í uml. 20 ár, valdi at skifta starv og fara at reka handil og bilverkstað saman við manninum, Karl Vidtfeldt.

Anna Sofía er ógvuliga aktiv í frítíðini og røsk til tað handaliga, men tey flestu kenna hana frá dansinum, har hon og Karl hava gingið til fráløru og luttikið á dansistevnum runt um í landinum. Umframt hetta undirvísa tey saman við øðrum børnunum á Sandi í dansi.

Anna Sofía og Karl eiga børnini Eyðnu, Kristoffur, Jóhannu og Elsubet, og sætta ommubarnið er á veg.

Dagurin verður hildin í Ungmannafelagnum Virkinum á Sandi leygarkvøldið.

## Prógv

26.juni fingu Marita Olsen, Skála og Poula Reinert Olsen, Saltnes handa prógv í samband við lokna útbúgving sum farmakonomar á Eysturoyar Apotek. Próvtøkan fór fram á útbúgvingarstovninum Pharmakon í Hillerød.




Sosialurin
Sosialurin
i